# Tað stuttligasta var, tá



**Revurin í Valbakkaskóginum er nakað svangur í dag. Um vikuskiftið varð hann umvendur til vegetar, og akkurát sum øll hini djórini, etur hann nú bara gras, nøtir og røtur og er nakað so søtur**




SJÓNLEIKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sjónleikarhúsið leggur í hesum døgum pall til eina serstakliga væleydnaða uppseting av leikinum um Klintrimús, har ein av sonnum fær eina kenslu av at vera til staðar í ævintýrheiminum hjá Thorbjørn Egner.

Havnar Sjónleikarfelag hevur seinastu mongu árini havt ein barnaklassikara á skránni við umleið trý ára millumbili. Eins og áður hevur felagið í ár valt ein leik hjá norska høvundanum Thorbjørn Egner. Seinast var tað Fólk og dólgar í Kardamummubýnum, sum við 63 framførslum setti met hjá felagnum.

Omanfyri fimmti fólk eru við í uppsetingini, har tey eftir øllum at døma hava plantað helvtina av plantaguni inni í salinum! Herligt, tí pallmyndin riggar so sera væl, at hon lættliga vinnur á mongu tøkniligu tilboðunum, sum børn í dag hava atgongd til. Tí tað er altso nakað annað, at sleppa inn í sjálvan heimin, enn at uppliva hann á einum skíggja.

### Klassiskt og modernað

Egi Dam leikstjórnar, og høvuðsleiklutirnar eiga Hanna Flóvinsdóttir, sum spælir Klintrimús, Barbaru Hentze í Stórustovu, sum er Skógmús Mortan, og Hjálmar Dam, sum er Mikkjal Revur.

Tað er týðuligt, at fólkini handan leikin ynskja at fortelja ta røttu útgávuna av søguni, sum jú er ein klassikari. Men tíbetur hava tey eisini lagað hana eitt sindur til nútíðina, og ikki minst, til børnini í dag. Hetta kemur eitt nú til sjóndar í litføgru og væl skornu búnunum, modernaða kropsmálinum og rútmunum, har elementir frá hip-hop, jazz- og teknifilmsmentantini sníkja seg inn av og á – væl stuðlað av einari framúr góðari ljósmynd og dugnaligum tónleikarum.

Yngsti sonurin og dóttirin eru eisini samd um, at pallurin er ordiliga flottur.

- Men, tað stuttligasta var, tá ið omman fór á flog, søgdu tey aftaná.

### Klokkuklárur sangur

Leikararnir koma sum heild væl frá uppgávuni – serliga tey, sum eiga høvuðsleiklutirnar. Tey eru sikkur í spælinum og syngja klokkureint. Onkrir av smærri leiklutunum eru í so spakir og tosa ov seint. Tey eru kanska óvand við áskoðarar, og skulu líka læra at elska tann partin av